# Dagsskrá og fundarfrásøgn frá skúlastýrisfundi í skúlanum á Argjahamri

| Dagur: 22.nov. 2017<br>Tíð:kl 16.00 – 18.00 | Luttakarar: Allan, Bergun, Vivian, Bjørghild, Jóhan, Bjørg og Marjun<br><br>Ikki møtt:Bjørg |
|---|---|

| **Dagsskrá** | | **Frásøgn**<br>*Samandráttur av kunningini/umrøðuni, niðurstøða/avgerð, ásetan av ábyrgdarhava og møgulig freist.* | **Miðlan** |
|---|---|---|---|
| 1. | Undirskriving av fundarfrásøgn (gerðabók) frá seinasta fundi (A) | Seinasta fundarfrásøgnin undirskrivað. | AM |
| 2. | Trivnaðarkanningin, Laila leggur fram | Trivnaðarkanningin er komin í lag sum ein liður í at skúlin skuldi endurskoða sína trivnaðarætlan<br>Tað vóru 155 av 364 sum luttóku í kanningini, sløk 43% hava svarað<br>Kanningin var gjørd í juni og august 2017 og tóku allir flokkar lut.<br>Flestu næmingar sum hava svara eru úr grunddeild, út við helmingurin 45%<br>Spurningarnir um viðrisgrundalagið og visjónirnar skorða í snit nakað omanfyri miðal áleið 7.<br>Samstarvið millum kontaktpersónar og lærarar er gott,<br>Sum heild er at siga at næmingar væl nøgdir við skúlan, men tølini eru tó nakað lægri fyri hádeildina, har tey vísa á at trivnaðurin er minni góður á fleiri økjum.<br>Tilfarið er ógvuliga rúgvismikið at illa ber til at geva eina nøktandi frágreiðing her í fundarfrásøgnini, tí verður kanningin viðfest.<br>Framløga hevur verið fyri skúlastýrið og lærarum. | Laila |
| 3. | Støðan á vestursíðuni á skúlagarðinum | Víst bleiv málviðgerðini av " Nýggjur vegur millum útstykkingina við Klingrutjørn, høllina og skúlan á Argjahamri"<br>Málið er farið ígjøgnu teknisku- og fíggjarnevnd og síðan á býráðsfundi. Skúlin og stýrið hevur verið púra óvitandi um, hvat ið gongur fyri seg.<br>Skúlastýrið hevur nýtt nógva orku uppá henda skúlagarð ein minni verkætlan er nú í gongd, men hetta við garðinum hevur enn onga heildarætlan.<br>Ein spurningur er, hvat ætlar kommunan við skúlagarðinum?<br>Hvat við øllum tí økinum,sum er tikið til høll og veg, hvat kemur ístaðin?<br>Stýrið veit sær ikki, hvussu hetta mál vendir, tí verða Gunnvør Balle, forkvinna í Mentunarnevndini og Jákup Dam formaður í teknisku nevnd boðsend til fundar mikudagin tann 29.nov kl 16.30. | MH |
| 4. | Ymiskt | Ætlanin er at hava ein felags foreldrafund í Stórustovu hósdagin 23.nov. kl 19. | AM |